

Dánial og vinir hansara (2)

Seinast hoyrdu vit um, hvussu Dánjal og vinmenninir vóru tiknir við til Bábael at verða fangar.

Men eisini blivu teir tiknir út til at verða tænarar hjá kongi.

Vit hoyrdu eisini um, hvussu Dánjal og vinmenninir ikki gera nakað, sum Gud ikki vildu hava teir at gera, sjálvt um tað var kongur sum bað teir.

Men nú fór Nebukarnezar kongur at fáa sovorðnar dreymar, sum gjørdu hann bangnan ... og hann kallaði til sín allar sínar vísu menn.

Hann segði: sigið mær hvat eg havi droymt... og sigið mær hvat tað týður, so skal eg gera tykkum ríkar... Men týða tit hann ikki, so skulu tit verða høgdir sundur og húsini brotin hjá tykkum.



Nú vórðu allir vísmenninir hjá kongi ræddir... tí teir kundu ikki bæði vita hvat kongur hevði droymt og týða dreymin.

Dánjal fekk hesi tíðindi at hoyra, fór til kongin og bað um tíð til at umráða seg, so skuldi hann siga honum dreymin og týða hann.

Kongurin gekk við til tað og Dánjal fór heim til vinir sínar, og segði, at nú máttu teir fara at biðja til Gud.

Námsfrøðingur
til Barnagarðin á Velbastað

Søkt verður eftir námsfrøðingi til stovn við børnum frá 0–10 ár. Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna. Løn sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Pedagogfelag.

Nærri fæst at vita við at ringja til stovni n, tlf. 28121 og tosa við Elsu Jacobsen.

Umsóknarfreistin er 15. februar.

Kirkjubøar Sóknar Kommuna
176 Velbastaður

ROKKJALLARIN

Vit átaka okkum at selja fyri fólk.

Eisini keypa vit deyðsbúgv.

ROKKJALLARIN - Tlf. 11990
Tinghúsvegur 42 - 100 Tórshavn

KROSSORÐAGÁTA

Loysnin frá seinastu viku

S	O	R	G	A	R	K	N	A	P	P	U	R		F	K	
U	R	I	N		A		A	K	R	A	N	E	S		L	
R	A	D	I	S	U	R				N	N		S	J	A	
N		D	P	A		A	R	K	A	T	A	L		A	R	
A		A	P		A		I		I	A	S	M	O	S		
M	O	R	A	K	N	Í	V	A	R		T		S	M	S	
A	L	I		A	T		N	L		A		S	T	U	N	
N	D			N	O	T	A	B	E	N	E		U	N		
S	U	N	N	A	N	A		A		K	O	Y	R	D	I	
H	R		A			M	A	N	N	A		K			L	
A	O	R	T	A			L		Ó	R	Ø	K	T		L	
L	M	E	R	I	C	S	S	O	N		K	I	E	V		
G	M		I	R	A			M		E	I	N		Ø	R	
I	U		U			S	U	M	M	A	R		G	O	R	R
	N	U	M	M	A	R			A	R	A	N		V	A	R
R	G	K		I	L	T		N	I	N			V	É	9	T

Vinnari: Hanna Lindenskov, Láarvegur 4, Tórshavn.

Hvønn leygardag
verður krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin hesaferð eru allar tær 6 »SKEMT-bøkurnar« hjá Óla Petersen.

Hósdagur
Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, mugu loysnirnar vera okkum í hendi í *seinasta lagi hósdagin*. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendi gátuna til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta« á bjálvan.

Navn

Bústaður

Bygd/býur

